# Bestu baðiumstøður í heiminum



Eitt serkenni við Reykjavík og Íslandi eru óavmarkaðu mongdirnar av heitum vatni úr tí gløðandi íslendsku undirgrundini, ið gevur ókeypis el og hita. Hetta hava okkara grannar fyri norðan dugað sera væl at gagnnýta. Ikki, bert til el og hita, men so sanniliga eisini til at forsøta sær lívið við. Sokallaðu heitipottarnir finnast á hvørjum horni, og í nógvum heimum, og tá tað kemur til uttandura svimjianlegg, so finnast ikki minni enn 15 bara í høvuðsstaðarøkinum. Eitt av hesum er Laurgardalslaug, ella World Class, sum liggur við tjóðarstadion hjá íslendingum, Laugardagsvøllin. Tað er ein fastur partur av gerandis- og frítíðarlívinum hjá íslendingum at svimja og njóta lívið í heita vatninum frá undirgrundini. Anleggini eru ógvuliga ymisk, men World Class við Laugardagsvøllin er uttan samanbering tað størsta og besta. Útyvir eina stóran svimjihyl upp á 50 metrar til longdar, eru nógvir smærri poolar og pottar og ikki at gloyma tær fantastisku spa-umstøðurnar, har opið er líka til klokkan 11 á kvøldi. World Class hevur eisini størsta fitness-anlegg í Íslandi við 5000 vitjandi gestum um dagin. Harafturat er ein 86 metrar langur vatnrutsjebani til børnini. Les meiri á www.worldclass.is


























